## Kapping um tannlæknastovu

Eiðis kommuna hevur keypt tannlæknastovuna í Hvalvík, sum hevur verið til sølu, síðani tannlæknin doyði brádliga herfyri. Men Eiðis kommuna var ikki einsamøll um at sýna áhuga fyri tannlæknastovuni. Sunda kommuna bjóðaði eisini, men eftir at tær báðar kommunurnar høvdu bjóðað nakrar ferðir, endaði Eiðis kommuna við hægsta boðnum, sum var 1,95 mió. krónur. Nú ætlar Sunda kommuna at fáa samstarv um tannlæknastovuna.

## Fleiri flogferðir

Samferðslumálaráðharrarnir í ES-londunum samdust fyrrapartin um ein nýggjan loftferðslusáttmála, sum millum annað ger tað møguligt at økja talið á flogferðum tvørtur um Atlantshavið. Bretland hevði ávísan fyrimun í tí gamla sáttmálanum og hevur roynt at muta ímóti einum nýggjum sáttmála. Men í dag góvust bretar við mótstøðuni, og sambært flutningskommiserinum, svensku Åse Tostensson, eru londini nú samd.



*- Eg skilji ikki grundgevingarnar hjá reiðaranum, tí Atlantic Navigator hevur júst tey somu rættindi, sum hann hevði, tá hann kom í flotan, sigur landsstýrismaðurin*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

stýrismaðurin sum so onga viðmerking til í løtuni.

- Vit hava sum nevnt onga formella umsókn fingið um, at skipið fer úr flotanum, ei heldur um, at annað skipið kemur í flotan í staðin. Vanliga er skotbráið, sum eitt felag fær til at brúka kvotuna, tvey ár, men viðurskiftini verða viðgjørd í hvørjum einstøkum føri, sigur hann.

Vit kunnu leggja aftrat, at í tíðindabrævinum, sum reiðarí sendi út, eisini stendur fylgjandi:

"Tað er keðiligt at koma við uppsøgnum, men komandi mánaðirnar vilja vit meta um, hvussu felagið á besta hátt kann brúka fiskiloyvini og skapa nýtt virksemi..."

### Ymiskar framleiðslur

Bjørn Kalsø endurtekur, at hann er sera harmur um, at felagið, sum stendur aftan fyri Atlantic Navigator, ætlar at taka skipið úr flotanum.

- Eg havi við stórum áhuga – og at kalla hvønn dag - fylgt við gongdini hjá hesum skipi, og tað er sera harmiligt, um henda vinna við framleiðslu av surimi nú dettur niðurfyri.

Landsstýrismaðurin heldur tað vera umráðandi, at svartkjafturin sum rávøra, ið er eitt stórt tilfeingi, fer til ymisk endamál, tí hetta ger, at vinnan verður meira fjøltáttað.

- Vit hava fleiri skip, sum landa svartkjaft til ídnað, sum síðan verður virkaður til mjøl og fóður, vit hava Atlantic Navigator, sum virkar surimi og mjøl úr rávøruni, og í triðja lagi eru eisini nøkur tons løgd upp á Kollafjord Pelagic, sum eru fryst til matna.

Bjørn vísir á, at aftrat hesum byggja teir, sum eiga Christian í Grótinum og Norðborg, eitt nýtt skip, sum eisini fer at hava møguleikar at gera meira burtur úr hesi rávøru.

### Onga ávirkan

Vanliga verða sínámillum fiskiveiðiavtalur millum lond roknaðar í toskavirði, og tí spurdu vit landsstýrismannin, um tað í framtíðini kann fáa ávirkan á fiskiveiðiavtaluna við eitt nú russar, um virkingin umborð á Atlantic Navigator heldur uppat.

- Nei, eg haldi ikki, at júst hetta kann gerast ein orsøk til, at vit fáa minni í okkara part frá russum, sigur Bjørn Kalsø.



*Jákup B og Pison landa í Klaksvík í dag. Teir hava millum 130.0000 og 140.000 pund undan Íslandi*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Línubátar hava góðan fiskiskap undir Íslandi

**Føroysk línuskip, sum hava verið undir Íslandi, hava fingið tvífalt so nógv sum skipini, ið royna undir Føroyum, og prísurin fyri hýsuna undan Íslandi hevur verið óføra góður**

**FISKIVINNA**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað hevur gingið væl hjá føroysku línubátunum undir Íslandi í vár.

Í dag landa Jákup B og Pison á Kósini, og teir hava báðir um millum 130.000 og 140.000 í part.

Hetta er fyrsti túrurin hjá Pison undir Íslandi í vár, men annar túrurin hjá Jákupi B. Tann fyrra túrin høvdu teir 180.000 pund.

Skipini hava fiskað millum 10 og 13 dagar hvønn túrin.

Pól Fuglø, landingarformaður, sigur, at skipini hava selt fyri ein miðalprís, sum er einar 16 krónur fyri kg.

- Meginparturin av veiðini hjá skipunum er hýsa, sigur hann.

### Helmingin minni

Mánadagin landaði línuskipið Núpur undan Íslandi. Teir høvdu 130.000 pund, og hjá teimum var eisini meginparturin av veiðini hýsa.

- Hendan dagin landaðu eisini Klakkur, Kvikk og Polarstjørnan, sum høvdu roynt undir Føroyum. Hesi skipini lógu um 70.000 pund í part.

Sum vit síggja, er veiðan hjá línuskipunum, sum royna undir Føroyum, bert helmingurin av veiðini hjá teimum, sum hava verið undir Íslandi.

- Eg havi skilt, at línuskipini, sum hava verið undir Íslandi, hava fingið upp í 18.000 pund á setuna.

Men fiskiskapurin hevur verið misjavnur. Summir dagar hava verið góðir, men aðrir dagar hava verið minni góðir. Sum heild, hava føroysku línuskipini undir Íslandi havt góðan fiskiskap í vár.

### Stóran týdning

Pól Fuglø veit at siga, at Núpur hevði tveir rættiliga góðar túrar undir Íslandi í fyrraárs vár, tá ið teir tveir fylgjandi túrar komu heimaftur við 200.000 pundum

- Eg vænti ikki, at vit fara at landa fleiri skip aftrat hesa vikuna. Spurningurin er, um onkur trolari kemur inn at landa í endanum av vikuni, men tað er ivasamt, nú upsafiskiskapurin í løtuni er rættiliga slakur, sigur Pól Fuglø, landingarformaður.

# ftur á Toftum

vælkomnum, sigur felagið.

Fyri at gera tiltakið so hugnaligt fyri so mong sum gjørligt, fer felagið eisini at skipa fyri alskyns tiltøkum á bryggjuøkinum, bæði fyri børnum og vaksnum.

Góður matur verður at fáa, og teir tiltiknu grillbúffarnir munnu aftur í ár fara at ganga sum heitt breyð. Pylsuvognur verður eisini opin, umframt at breyð við góðum viðskera verður til keyps.

Um kvøldið verður skipað fyri dansi í tjaldinum, har Countryorkestrið, sum vit kenna frá undanfarnu festivalum, kemur at spæla.

Toftir er gomul útróðrarbygd, og tað hava altíð verið nógvir báteigarar í bygdini.

- Soleiðis er eisini í dag, og tí hava vit í bátafelagnum í umbúna at útvega felagnum eini felagshøli. Ætlanin er nevniliga, at møguligt yvirskot av tiltakinum skal fara til eitt slíkt endamál, sigur felagið.

Bátafelagið á Toftum sigur, at øll eru hjartaliga vælkomin á bátastevnuna.